# Gott at Helgi ikki er lækni!

TÓRI HØJGAARD
formaður í Ung fyri Miðflokkin

**Helgi Abrahamsen roynir í einum lesarabrævið enn einaferð at ræða okkum frá at hugsa tankan, at vit ein dag kunnu gera okkum leysar av blokkstuðlinum.**

Miðflokkurin hevur fyri tíð síðan víst á, at í dag er blokkurin uml. 15% av inntøkugrundarlagnum hjá Landskassanum, meðan blokkurin fyri fáum árum síðan var nærum 30% av inntøkugrundarlagnum.

Hetta hevur, av einari og hvørjari orsøk fingið Helga at halda at Miðflokkurin kundi hugsa sær, at blokkurin bleiv strikaður frá einum degi til annan, og tískil vil Helgi ávara okkum um, at høvdu vit tikið blokkin vekk, so høvdu vit skula rinda fleiri túsund kr. meir í skatt pr. íbúgva. Helgi hevur sjálvandi rætt í tí. Skattabyrðan hevði blivið mundi tyngri, um blokkurin bleiv burtur eftir einum degi.

Men lat okkum brúka eina mynd, sum sjálvt svartskygdir sambandsmenn áttu at skilt: Í læknaheiminum er tað eitt kent fyribrigdi, at man tíðum er noyddur at geva einum sjúklingi heiluvág, ið er vanabindandi. Tá sjúklingurin er komin fyri seg, og ikki hevur heiluvágin fyri neyðini longur, so er tað vanliga so at læknin fer undir at skera niður á nøgdina av heiluvági ið verður latin sjúklininum, soleiðis at sjúklingurin so við og við gerst minni bundin at heiluváginum, og uttan ov nógv hjáárin, skal sleppa burturúr nýtsluni.

Helgi vil við lesarabrævi sínum ræða føroya fólk til at halda at Miðflokkurin vil hava blokkin at hvørva eftir stuttari tí, men hetta er als ikki so. Miðflokkurin hevur einans víst á at føroyska samfelagði eftir hondini er við at sleppa av við vanabindandi heiluvágin, og at enda fer at gerast ført fyri at leggja hann á hillina med alla.

## Frasa

JOHN S. MYLLHAMAR



At fólk finna sær Gyldendals Fremmend Orbog fram, tá ið tey leggja seg út í kjak ella gera viðmerkingar til samfelagsmál skyldast aloftast undirlutakenslur, at ein á tann hátt roynir at hevja seg. Eisini kann tað liggja til.

Í Dimmalætting tann 31 mai, finna vit eitt gott dømi um hetta. Undir yvirskriftini: Tann provinsiella og primitiva purisman, ger Virgar T. Dalsgaard seg til talsmann fyri vælskiljandi føroyskt gerandismál, og brúkar høpisleys orð og heiti um teir føroyingar, ið royna at fara væl um móðurmálið.

Tá ið eg hevði stavað meg gjøgnum frasuna, mátti eg hava á munni: Guð viti, hvørja føroyska bygd hesin Virgar umboðar, har tey snakka hatta málið. Í heimbygd míni hugsi eg, at vanliga fólkið skilir orð sum bygdarsligt betri enn provinsielt, einfalt betri enn primitivt, og málreinsan betri enn purisma.

# Tann øvugta verð



*Maðurin gongur í »kjóla«, meðan kvinnan er í buksum. Eisini ein partur av skotska tjóðarbúnanum*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

**Tá tú sær skotsku mannfólkini í kilti, hugsar tú kanska í tí romantiska horninum. Um Braveheart. Men tá tú so sær konufólk í buksum og mannnfólk í kjóla, kennist tað eitt sindur undarligt**

LANDSDYSTUR
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Vit vita tað øll. Skotar eru jú kendir fyri at ganga í kilti, og teir smæða seg sanniliga ikki burtur hesar dagarnar upp undir landsdystin á Svangaskarði millum Føroyar og Skotland. Gøtur og strætir eru á tremur við kiltklæddum skotum, og tað kemur fyri at vera púra náttúrligt.

Flestu teirra, sum ganga í kilti, eru mannfólk, og tað er líka romantiskt sum tá tú hugtikin sær Mel Gibson ríða runt í kilti í filminum Braveheart. Og tá tú so sær eina snøgga skotska kvinnu í kilti, gevur tað líkasum upp aftur betri meining.

Men um dagarnar fangaði myndamaður okkara hetta parið, og knappliga fekst tú kenslu av, at hetta var tann øvugta verð. Tí nú sást tú eina kvinnu í buksum og ein mann í kjóla!

Nú eru vit so von við, at okkara egnu kvinnur ota seg inn á »okkara« øki, og ganga í buksum. Og tað eru tær eisini vælkomnar til. Men fyri tað er óhugsandi, at føroysk mannfólk fóru at ganga í kjóla – eisini um vit so velja at kalla tað kilt.

Men hetta er nakað, sum sjálvandi kann henda, tá ið tjóðarbúnin er kjóli. Stuttligt sá tað í hvussu er út, tá kynini skiftu um stíl.

## Smyril fullsettur til landsdyst

Sum kunnugt fer Smyril at sigla av Havnini inn á Runavíkina í sambandi við landsdystin á Svangaskarði móti skotum. Ferðaseðlar verða seldir á Farstøðini og á Kunningartstovuni á Vaglinum.

Og í báðum støðum verður latið væl at søluni. Á miðdegi hevði Kunningarstovan so at siga ongar ferðaseðlar eftir, meðan tey á Farstøðini høvdu góðar eitthundrað eftir.

Á báðum støðum vænta tey tískil, at útselt verður, áðrenn Smyril fer av Havniniklokkan 15.45. Við í ferðaseðlaprísinum er eisini bussur av kaini í Runavík niðan á stadionøkið á Svangaskarði – og oman aftur eftir dystin.

Tað er fyri tað allarmesta skotar, ið keypa ferðaseðlarnar, verður upplýst.

**(-leo)**